**Munnligur fyrispurningur**

til Johan Dahl, landsstýrismann

**um at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt land**

1. Tekur Sambandsflokkurin undir við, at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt land og at endurnýggja samtarvið við Danmark soleiðis, at talan verður um felagsskap millum javnbjóðis og sjálvstøðug lond ?

2. Taka Sambandsflokkurin og landsstýrismaðurin undir við at skapa eina breiða politiska semju um eina 10-ára ætlan fyri at røkka fult fíggjarligt og fyrisitingarligt sjálvbjargni ?

3. Taka Sambandsflokkurin og landsstýrismaðurin undir við, at útskriva fólkaatkvøðu um at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt land ?

4. Hvørji ítøkilig stig fara Sambandsflokkurin og landsstýrismaðurin at taka nú í 2012 fyri at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt land ?

**Viðmerkingar**

Ongantíð áður hava umboð úr so nógvum flokkum á Løgtingi sagt seg vilja hava broytingar í ríkisrættarligu støðuni, og sagt seg vilja virka fyri, at Føroyar verða skipaðar sum sjálvstøðugt land, sum nú. Breiður meiriluti er tí eisini á Løgtingi fyri at endurnýggja ríkisrættarligu støðu okkara og at skipa Føroyar sum sjálvstøðugt land.

Tí er nú søguligur møguleiki fyri, at fáa eina tjóðarsemju millum politisku flokkarnar um eina heildarætlan fyri skipan av Føroyum sum sjálvstøðugt land og einum endurnýggjaðum samstarvi við Danmark.

Við jøvnum millumbilum eru søguligir møguleikar fyri, at gera stór politisk framstig. Ein av hesum søguligu møguleikum er nú. Fyritreytin fyri, at nakað skal henda er tó, at ítøkilig stig verða tikin, so orð verða til gerð.

Fyri at fáa staðfest ta støðu, ið samgonguflokkarnir og landsstýrisfólkini hava til málið, verða spurningar settir landsstýrisfólkum úr øllum samgonguflokkum um málið.

Á Løgtingi, 24. september 2012

**Kristina Háfoss**
Løgtingskvinna fyri Tjóðveldi